# Stjórin má fáa neyðug amboð at arbeiða við

**LANDSSJÚKRAHÚSIÐ** Politikarar mugu geva einum nýggjum stjóra á Landssjúkrahúsinum neyðug stýringsamboð, so at ikki eisini hann kemur í óføri, sigur Jóanna Djurhuus, forkvinna í Búskapar og Løgfrøðingafelagnum

Áki Bertholdsen

- Tey, sum fara at søkja starvið sum stjóri á Landssjúkrahúsinum eiga at gera sær greitt, at talan er um ein heitan sess, sum er ótryggur at sita í.

Tað heldur Jóanna Djurhuus, forkvinna í Búskapar og Løgfrøðingafelagnum.

Hon hevur ikki orsøk til at halda annað enn at Allan Skaalum hevur gjørt eitt gott arbeiðið í starvinum sum stjóri á Landssjúkrahúsinum.

Men hann er tann fjórði stjórin á rað sum kemur sær í óføri av fíggjarligum trupuleikum á Landssjúkrahúsinum hesi seinastu 12-14 árini og sum er noyddur úr starvi av tí sama.

Jóanna Djurhuus leggur dent á, at hon kennir ikki smálutirnir í hesum málinum.

- Men støðan á Landssjúkrahúsinum kundi bent á, at stjórin hevur ikki nóg góð amboð at stjórna sjúkrahúsinum við.

Í hesum sambandi vísir hon til nógv umrøddu Valcon kanningina, sum varð gjørd fyri nøkrum árum síðani.

- Tann kanningin vísti á nakrar ábøtur, sum vóru neyðugar fyri at tað kann bera til at stýra fíggjarligu gongdini neyvari.

Hon staðfestir, at tað er ein politisk avgerð um at seta tey tilmælini í Valcon kanningini í verk.

Og tað heitir hon nú á politiska myndugleikan um at gera.

> **Næsti stjórin á Landssjúkrahúsinum má gera sær greitt, at talan er um ein heitan og ótryggan sess**

### Mugu taka avgerð

Men hon mælir eisini politiska myndugleikanum staðiliga til at taka eina yvirskipaða avgerð um, hvørjar tænastur, Landssjúkrahúsið skal veita og hvørjar viðgerðir skulu gevast.

- Og so má myndugleikin betala fyri tað.

- Hinvegin má politiski myndugleikin so eisini gera greitt, hvørjar viðgerðir og tænastur, teir ikki eru sinnaðir at betala fyri at heilsuverkið skal veita føroyingum.

Jóanna Djurhuus heldur, hetta eru neyðug amboð, sum politiski myndugleikin má geva tí næsta stjóranum á Landssjúkrahúsinum so at ikki eisini hann kemur sær í óføri.

Tað er eisini óvirðiligt mótvegis sjúklingum at gevast við fleiri viðgerðin tá ið árið er hálvrunnið, so her krevst onkusvegna betri tilrættislegging, leggur hon afturat.

- Men krevur politiski myndugleikin eina betri fíggjarstýring, má hann eisini geva tí næsta stjóranum tey neyðugu amboðini at stýra við, so at vit ikki aftur standa í somu støðu um eitt ár, leggur hon afturat.

aki@sosialurin.fo



*Krevur politiski myndugleikin betri fíggjarstýring á Landssjúkrahúsinum, má hann geva tí nýggja stjóranum tey neyðugu amboðini, so at ikki eisini hann kemur sær í óføri, sigur Jóanna Djurhuus, forkvinna í búskapar og løgfrøðingafelagnum*

# Avloysarin hjá Smyrli er klárur

**STRANDFERÐSLAN** Regina Baltica fer at røkja suðuroyarsiglingina hjá Smyrli frá hálvum september til hálvan oktober, men ferðaætlanin verður broytt

Áki Bertholdsen

Tað er nú endaliga greitt, at tað verður Regina Baltica, sum skal avloysa Smyril í rutusigling ímillum Suðuroy og Havnina, tá ið Smyril fer í dokk um tríggjar vikur.

Herfyri skrivaði Strandferðslan undir leigusáttmála um skipið og Conrad Gaard Joensen, rakstrarleiðari á Strandferðsluni, sigur, at Regina Baltica kemur til Føroya um hálvan september og verður sett í rutuna ímillum Suðuroy og Havnina tann 17. september.

Og her verður hon siglandi í fýra vikur, til Smyril kemur aftur.

Regina Baltica er áleið líka stór, sum Smyril og hon hevur eisini stabilisatorar, men hon nógv hægri og tyngri at manøvrera, so tað er longri at leggja at og fara frá bryggju, umframt at pullartar ikki passa til.

Av tí sama fer hvør ferð at taka 2 tímar og 10 minuttir, sum er 20 minuttir longri enn Smyril brúkar.

Av tí tama fer ferðaætlanin um Suðuroyarfjørð fer at verða nakað skerd hesa tíðina, tí Regina Baltica fer at sigla tveir túrar um dagin, ella 14 túrar um vikuna.

Harafturat eru fráferðirnar úr Suðuroy og úr Havn nakað broyttar hesa tíðina.

Tilsamans vera 24 fólk við Regina Baltica og tað gevur henni rætt til at føra 400 ferðafólk ímillum Suðuroy og Havnina.

Tað er helvtin av tí, sum Smyril tekur, men Conrad Gaard Joensen sigur, at í september mánaði er tað nó mikið at røkta tørvin. Men skuldi tað verið, ber til at seta eyka manning umborð, tí so ber eisini til at taka fleiri ferðafólk.

Ferðaætlanin hjá Regina Baltica er løgd og er lýst á heimasíðuni hjá Strandferðsluni, sum er á www.ssl.fo



*Regina baltica fer at røkja Suðuroyarsiglingina frá hálvum september til hálvan oktober*